# Starv í kreditora-bókhaldinum

Gjaldstovan hevur um hendi Landsroknskapin, Búskaparskipan landsins, og ein stóran part av almenna bókhaldinum.

Á Gjaldstovuni arbeiða 32 fólk.

Kjarnin í Búskaparskipan landsins er Oracle E-business suite. Av øðrum skipanum kunnu verða nevndar:
— Felags lønarskipan
— Búskettskipan
— Leiðslukunningarskipan
— Dátuvøruhús.

Í kreditorabókhaldinum verða rokningar til tað almenna ljóslisnar (skannaðar) og neyðugar skrásetingar verða framdar. Síðan verða rokningarnar sendar víðari í eini verkgongdarskipan elektróniskt til teir ymsu almennu stovnarnar. Kreditorarbókhaldið hevur um hendi umsitingina av øllum rokningarflowinum, t.e. at yvirvakja og alla verkgongdina frá móttøku til goldið verður. Í hesum liggur t.d. at gera feilrættingar og at kanna, hví rokningar ikki verða avgreiddar. Kreditorabókhaldið hevur eisini um hendi at svara fyrispurningum og at testa broytingar í skipanini. Í løtuni eru einir 300-400 brúkarar av rokningarverkgongdarskipanini.

Arbeitt verður í løtuni við, at tað almenna skal hava rokningar elektróniskt.

Talan er um góðar arbeiðsumstøður, bæði tá ið ræður um høli og útbúnað. Gjaldstovan arbeiðir við førleikamenning, hevur eina flekstíðarskipan, og í Fíggjarmálaráðnum eru góð kantinuviðurskifti.

**www.gjaldstovan.fo**



Eitt starv í kreditorabókhaldinum á gjaldstovuni er leyst at søkja.

**Arbeiðsuppgávurnar eru í høvuðsheitum:**
— skanna fakturar
— skráseta grundardátur
— skráseta útlendsk gjaldoyru
— skráseta afturvendandi rokningar
— skráseta í høvuðsbókhaldi
— avgreiða fyrispurningar m.a. um útgjaldingar
— vegleiða stovnum í ymsum fyrispurningum
— leita fram skjøl og arkivera
— feilrættingar

Viðkomandi kann verða settur til onnur arbeiði innan roknskaparhaldið.

**Krøv til starvið:**
Hægri handilsskúli e.t. og/ella viðkomandi arbeiðsroyndir. Tað týdningarmesta er, at viðkomandi skilir væl bókhald, hevur góðan ordan í sínum arbeiði og hevur lætt við at hava yvirlit. Arbeiðið á stovninum er í stóran mun skipað í bólkum. Tí skulu tey, ið verða sett, hava góð samstarvsevni og gera sítt til, at bólkurin arbeiðir væl saman.

Gjaldstovan kann bjóða eitt spennandi arbeiðsumhvørvi, har fakliga stigið er í støðugum framburði, og har tað verða brúkt framkomin EDV-amboð.

**Setanarviðurskifti:**
Arbeiðstíðirnar eru 39 tímar um vikuna, og starvið er lønt samb. sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í Bólki II. Meira fæst at vita við at venda sær til gjaldstovuna á tel 35 24 00.

**Umsókn:**
Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu verða sendar til Føroya Gjaldstovu, Traðagøta 39, Boks 2009, 165 Argir. Umsóknarfreistin er 26. mars 2007.

DIMMALÆTTING 341200

STARVSLÝSING

## Goymslufólk

Søkt verður eftir dugnaligum og álítandi goymslufólki til maskinmiðstøðina í Kollafirði at byrja skjótast til ber. Maskinmiðstøðin hevur um hendi viðlíkahald av entreprenørmaskinum hjá Landsverki og høvuðsgoymslu av eykalutum og amboðum, herundir innkeyp og viðlíkahald av hesum.

Arbeiðsuppgávur
· útflýggjan av eykalutum og amboðum
· viðlíkahald av goymslu og amboðsrúmi á maskinmiðstøðini

Førleikakrøv
Tann, ið settur verður, skal hava royndir innan goymslustýring og hollan teldukunnleika. Harumframt er kunnleiki til entreprenørmaskinur og lastbilar ein fyrimunur, men eingin treyt.

Umsøkjarin skal hava vanligt koyrikort.

Setanartreytir
Løn og setanartreytir annars eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir
Umsóknir skulu sendast Landsverki, Postsmoga 78, 110 Tórshavn,

ella til lv@lv.fo, og skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 28. mars, 2007. Merkið umsóknina „Umsókn goymslufólk." Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jóan Petur Patursson, rakstrarleiðara, á tlf. 540 950 ella umvegis teldupost jpp@lv.fo. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega-, byggi- og havnamyndugleikauppgávur og flogvallamál. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og tyrlupallar.*

## HEVUR TÚ HUG AT GERAST STARVSLESANDI



Í starvslestrinum fært tú innlit í politisku skipanina og hvussu almenna fyrisitingin virkar. Tú kanst eisini fáa kunnleika um ávíst málsøki í sambandi við lestraruppgávu. Ljóðar hetta áhugavert, kanst tú søkja um at sleppa í starvsvenjing á Løgmansskrivstovuni ella í einum av stjórnarráðunum í eitt lestrarhálvár.

Stundar hugur tín longri út í heim, kanst tú eisini gerast starvslesandi á sendistovum Føroya í Brússel, Keypmannahavn, London ella Reykjavík.

Fyri at søkja skalt tú lesa á lærdum háskúla og tað er ein fyrimunur at hava lokið grundútbúgving á bachelor-stigi. Starvslesturin kann, um tín útbúgvingarstovnur góðtekur tað, eisini gerast partur av útbúgving tíni.

Les meira á www.tinganes.fo undir Størv.

Umsóknarfreistirnar eru
1. apríl (fyri seinna lestrarhálvár) og
1. oktober (fyri fyrra lestrarhálvár).

sansir.fo

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

VIT DRAGA EINA LÍNU · VIT SETA SKYNSEMI Í HÁSÆTI · VIT VILJA VITA · VIT BRÓTA SLÓÐ

Heimatænastan

## Søkt verður eftir húsum til dagtilhald til eldri

Nærverkið søkir eftir einum húsum í Tórshavn, ið skulu nýtast til dagtilhald til eldri fólk.
Húsini skulu vera áleið 200 m2.
Tað er ein fyrimunur, um tey eru í einari hædd og liggja tætt við miðbýin.

Áhugað biðjast venda sær til:
Ernu Háberg tlf.: 318102 ella 228004,
ella Gunnleyg Durhuus tlf.: 304020 ella 221540

NÆRVERKIÐ

sansir.fo

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

**www.naerverk.fo**

Vikuskiftisvaktin hjá

**SOSIALINUM & PORTALINUM**

er at hitta alt vikuskiftið á

**TELEFON 22 50 00**

Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum

VIVA

Visti tú ikki tað? Sosialurin